Framhald av síðu 27

Innleiðandi róðrarnir

Klokkan eitt leygardagin skuldi innleiðandi róðurin hjá kvinnunum byrja, men á Scilly verður føroysk presisheit nýtt, so klokkan mundi vera nærri hálvgum tvey, áðrenn flaggið fór niður. Og hóast ávaringina um startin, sum vit høvdu fingið kvøldið fyri, so var starturin hjá okkum syndarligur. Vit lógu úti við eina bátslongd aftan fyri teir fremstu bátarnar og haraftur at fløktust árarnar við árarnar hjá bátinum, sum lá við síðuna av okkum. So faktiskt róðu vit ikki tey fyrstu fimm seks tøkini, men so kom ferð á. Upp á stutta tíð róðu vit okkum frá einum triðaftasta plássi fram millum tríati teir fremstu bátarnar. Men so kom stígur í, kreftirnar byrjaðu at ganga undan. Men vit hingu í og endaðu á einum 26 plássi, bert tveir bátar frá B bólkinum. Hetta hevði við sær, at vit skuldu rógva fyrsta finaluróðurin í C bólkinum.

So vóru tað menninir, sum stóðu fyri tørni. Teir lógu betri fyri í startinum, men tá teir tóku fyrsta takið, brotnaði annar pinnurin, sum árin liggur í. (Gig´s hava ikki tollar, sum teir føroysku bátarnir, men tveir pinnar, sum halda árini). Tað var tollurin hjá Skarphéðinn, sum brotnaði, men hann bar skjótt at og ikki mundu tað vera meir enn tvey tøk, so hevði hann skift tollin út og fekk róð saman við hinum. Men uttan iva fingu teir allir ein hvøkk. Menninir lógu væl fyri allan vegin inn eftir, men teir komu í ein ógvusligan aldudal. Aldurnar stavaðu frá teim mongu áskoðarabátunum, sum alla tíðina sigla framvið. Teir eru sera naskir, hesir bátarnir. Teir fylgja teim fremstu bátunum, og leggja líka í um teir krossa feltið, og harvið geva teim aftaru bátunum stórar trupulleikar. Menninir á Kerens endaðu eisini í C bólkinum. Teir róðrarnir skuldu rógvast seinni um dagin. Teinurin tá var 2.000 metrar.

Finaluróðrarnir

Ikki kann sigast, at vit vóru heilt nøgdar við at vera í C bólkinum, tí málið hjá okkum var at koma í B bólkin beinanvegin, men tað gekk ikki. Og vit vóru sera vónbrotnar av hesum, serliga orsakað av startinum. Men róðurin í C bólkinum gekk bara heilt væl. Vit vunnu róðurin og sluppu sostatt upp í B bólkin, sum skuldi rógva annan finaluróðurin sunnumorgunin klokkan hálvgum ellivu.

Hjá monnunum eydnaðist tað tíverri ikki at koma upp í B bólkin. Teir endaðu á einum fjórða plássi, so teir skuldu rógva annan finaluróðurin aftur í C bólkinum. Og harvið var greitt, at teir ikki kundu fáa eitt endaligt úrslit í A bólkinum.

Tað vóru nøkur sera troytt róðrarfólk, sum tørnaðu inn á hotellinum hetta leygarkvøld. Tey høvdu róð 5. 000 metrar kapp tilsamans hvør henda dagin, og tað er púra óvanligt. So tað var onki at siga til at fólk vóru nokk so moyr.

Sunnumorgunin var so byrjað at rógva hjá kvinnunum klokkan hálvgum ellivu. Og ikki gekk so væl hjá kvinnunum heldur hesuferð. Vit lógu á einum fjórða og fimta plássi longi, men at enda komu vit so mikið væl aftur, at vit rættiliga blandaðu okkum upp í kappingina um at vinna B bólkin. Tríggir bátar komu so at siga stavn um stavn inn um málstrikuna. Og fólk søgdu aftaná, at hesin róðurin hevði verið tann mest spennandi hjá kvinnunum. Men tá úrslitið kom, var greitt, at vit blivu nummar trý, og náddu sostatt ikki at flyta upp í A bólkin.

Hjá monnunum gekk tað eitt sindur betri henda dagin, men teir náddu kortini heldur ikki at flyta upp í B bólkin. Hesuferð blivu teir nummar trý. Teir lógu væl fyri í róðrinum og kappaðust alla tíðina við teir fremstu bátarnar, men endaðu sum sagt á triðja plássinum, so nú ráddi um hjá teimum at fáa eina so góða endaliga plasering í C bólkinum sum gjørligt.

Seinnapartin klokkan eitt korter til trý fór so tann endaliga finalan hjá kvinnunum í gongd. Og her hendi nakað keðiligt, sum fekk panikk í. Vit fingu ikki fatur á boyuni í tí fasta startinum. Vit gjørdu vart við hetta til dómarabátin við at rætta hondina upp, men hann koyrdi kortini flaggið upp, og so var bara at fáa bátin at liggja beinan, áðrenn flaggið fór niður aftur. Og tað gekk bara ein lítil løta, so fór flaggið niður. Vit vóru slettis ikki frammarlaga í róðrinum í fyrstuni, men byrjaði at koma okkum so við og við. Vit endaðu nummar tvey. Aftan á róðurin søgdu allar, at tað var í berum illsinni, at vit komu aftur, tí at kreftir vóru ongar eftir teir seinastu fimm hundrað metrarnar.

Menninir endaðu sum nummar trý í C bólkinum. Samanlagt eitt 27. pláss av 81 bátum.

Vit høvdu ein bát, sum stimaði við okkum, so at vit fingu høvi til at síggja róðrarnar. Og ein av monnunum, sum var við, segði við okkum, at vit skuldu bara vera glaðar fyri annað plássið, tí um vit vunnu B bólkin, so høvdu vit heilt sikkurt verðið diskvalifiseraðar, orsakað av, at vit ikki høvdu fatur í startboyuni. Men av tí at vit ikki vunnu, so sluppu vit við skrekkinum. Ein heldur løgin hugburður eftir okkara meining.

Men sum ein av teim lokalu har um leiðir segði: »This is Scilly – anything can happen«.

Kappróður á Scilly 2002

Harbourside Hotel

Eftir róðrarnar sunnudagin bjóðaði høvuðsstuðulin ein bita á hotellinum, sum vit búðu á.

Vit búðu á Harbourside Hotel, sum stutt sagt liggur á keiini á St. Mary´s. Har vóru, umframt føroyingarnar, umboð fyri The Faroese Partnership og onnur, sum hava tilknýti til oljufeløgini aðrastaðnis frá. Maturin var avbera góður og folk hugnaðu sær óført. Tá fólk høvdu fingið sær omaná, slógu vit ring og dansaðu føroyskan dans, meðan Burtur á heiði og Veturin kom við kulda og kava, rungaðu inni í matstovuni á hotellinum.

Annars er at siga um hotellið, sum vit búðu á, at vit búðu einastandandi væl. Vit høvdu alt hotellið fyri okkum sjálvi og starvsfólkini vóru framúr blíð og fryntlig. Tey hjálptu okkum nógv og vóru altíð til reiðar at svara, um vit høvdu onkran spurning.

Um veðrið er at siga, at tað var sól allar dagarnar. Onkran dagin var lotið kalt, men eitt er heilt vist, og tað er, at nógvar føroyskar nasar blivu sólbrendar hesa vikuna, meðan vit vóru á Scilly.

Heimferðin

Mánadagin 06.05.02 klokkan hálvgum fimm seinnapartin sigldi ferjan, The Scillonian okkum aftur inn á fastlandið. Og nú byrjaði drúgva heimferðin. Men hon gekk bara heilt væl, og týsdagin stóðu vit øll aftur í øllum góðum á føroyskari jørð. Glað og væl nøgd, men so avbera troytt, við minnum fyri lívið í varveitslu. Í Kollfjaradali varð takkað fyri ein góðan túr og so skiltust leiðirnar hjá manningunum, sum á Scilly vóru sum eitt umboðandi Føroyar, men sum nú í summar fara at berjast í hvør sínum felagið fyri at endurvinna Føroyameistaraheitini frá 2001.

Føroin var stór, tá kvinnurnar høvdu vunnið seg upp í B bólkin

Starvsfólk
til barnagarðin í Hvalvík

Hvalvíkar kommuna byggir ein nýggjan barnagarð í Hvalvík, har pláss verður fyri 45 børnum í aldrinum 0-7 ár. Ætlanin er, at stovnurin letur upp 01. oktober 2002, tó við fyrivarni fyri møguligum seinkingum. Í hesum sambandi verður søkt eftir starvsfólki.

Leiðari
Høvuðsuppgávur:
- At hava leiðsluna og ábyrgdina av stovninum
- At samskipa arbeiðið á stovninum
- At skapa trivnað á stovninum

Vit sóknast eftir persóni, ið:
- Kann ganga á odda og dugir væl at fyrisita/leiða
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og myndugleikar
- Er opin fyri nýhugsan

Útbúgving/royndir:
- Námsfrøðiliga útbúgving

Royndir innan leiðslu og umsiting kunnu vera ein fyrimunur.

Lønar- og setanarviðurskifti:
Eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Starvsfólk:
Eisini verður søkt eftir pedagogum hjálparfólkum.

Vit sóknast eftir persónum, ið:
- Eru fleksiblir
- Hava opið sinni
- Taka støði í barninum
- Taka barnið í álvara
- Leggja stóran dent á eitt gott samstarv við foreldur og samstarvsfelagar.

Lønar- og setanarviðurskifti:
Eru sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum seinkingum, og verða størvini sett frá hesum degi.

Meir fæst at vita við at venda sær til kommunuskrivstovuna, telefon 422350.

Umsóknir saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Hvalvíkar Kommunu, 430 Hvalvík, í hendi í seinasta lagi 24. mai.

Hvalvíkar kommuna

»Fótboltsskúla-venjari«
Er hetta ikki júst nakað fyri teg?

...sigur tú ja, verður tú ein snøggan dýnujakka heitari!!

Fótbóltssamband Føroya ætlar at skipað fyri fótbóltsskúlum aftur í ár.

Hetta er eitt sosialt tiltak, har børn úr øllum landinum í aldrinum 8–14 ár møtast til tveir upplivingar-ríkar dagar, og er hetta ein líka stór uppliving fyri venjararnar.

Fyri at hetta tiltak skal framhaldandi eydnast væl, so krevst at vit fáa nokk av venjarum og lýsa vit tí eftir venjarum til fylgjandi skúlar:

28.06.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**29.06.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**í Tórshavn**
28.06.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**29.06.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**í Vági**
28.06.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**29.06.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**í Vágum**
28.06.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**29.06.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**í Klaksvík**
05.07.02	**kl. 13.00 – 18.00**	**og**	**06.07.02**	**kl. 10.00 – 15.00**	**á Toftum**

Treytir fyri at tilmelda er, at tú hevur tikið minst eitt venjara-grundskeið ella at tú hevur hollar royndir innan venjara-yrki, og at tú ert fylt/fyltur 16 ár.

Freistin at tilmelda er 15. mei 2002, hetta kann gerast við at senda niðanfyri standandi tilmeldingarlepa til FSF, Postrúm 3028, FO-110 Tórshavn, ella at faxa lepan til fax nr. 319079.

✂----------

TILMELDINGARLISTI
Til Føroya Fótbóltsskúla 2002

Navn: _____ **Aldur:** _____

Bústaður: _____ **Tlf.:** _____

Lokið skeið/royndir: _____

Ynski at vera venjari á fótbóltsskúlanum í/á: **Tórshavn** ❑ **Toftum** ❑ **Klaksvík** ❑ **Vágur** ❑ **Vágar** ❑

Ynski at venja aldursbólk: **8–10 ár** ❑ **10–12 ár** ❑ **12–14 ár** ❑

Sendast/faxast í seinasta lagi 15. mei 2002, til:
Fótbóltssamband Føroya • Postrúm 3028 • 110 Tórshavn • Telefax: 319079 • e-postur: gudrid@football.fo

TOR SHIPPING

Søkt verður eftir fólki til tangaskipið »Bergina«

Søkt verður eftir dugnaligum og royndum motormonnum dekkarum (fulltiknum matrósum) til tangaskipið »Bergina«.

Min. krøv til umsøkjarar:
- Drúgvar royndir
- Góðkenda læknakanning (bláa bókin)
- STCW-góðkent trygdar-/ og brandskeið
- Kunna skandinaviskt og enskt mál
- Dekkararnir skulu verða egnaðir til kagtænastu

Áhugaði biðjast vinarliga senda skrivliga umsókn til:

SP/F Bergshav
Niels Finsensgøta 23 · Box 1252
FO-110 Tórshavn · Tlf. 318531 · Fax 319369

GER KVETTIÐ!
Fyrstafloks seyðahegn
50 m X 90 cm
6 tráða

Yvir og undirtráður 3mm
Millumtráður 2,5mm
Meskavídd
B. 15cm H. 14cm til H. 22cm
Galvanisering 240 g/m²

Einans kr. 375,-
Fa. H.J. Michelsen
tlf. 314414 - 263707

Bilur við til sølu

Citroën Xantia Diesel til sølu

Tlf. 213376 ella 447071

Fólk søkist

Tvær royndar konur søkjast til reingerðing.

Ring 283924.

Vaskarí & reingerðing

www.sosialurin.fo